# P/F Elektron

**Staravegur 9**
**Postboks 3219**
**110 Tórshavn**

**Skrás.nr. 100**

## Ársfrásøgn fyri 2018

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á ársaðalfundi felagsins hin 10. apríl 2019

---

Christian Andreasen
Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit

| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 6 |
| Leiðslufrágreiðing | 7 |
| **Ársroknskapur** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 11 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2018 | 18 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2018 | 19 |
| Peningastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember 2018 | 21 |
| Notur til ársfrásøgnina | 22 |

# Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018 fyri P/F Elektron.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Vit meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu felagsins tann 31. desember 2018 umframt av felagsins virksemi og selskabets peningastreymi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018.

Vit meta, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenningar ársaðalfundsins.

Tórshavn, tann 10. apríl 2019

**Stjórn**

Ulla Joensen
stjóri

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Sóleyð Maibritt Hofgaard<br>formaður | Brian Smedemark | Poul Marner Mortensen |
| Atli Suni Leo | Marner Hansen<br>starvsfólkavalt umboð | Elsa Maria Hansen<br>starvsfólkavalt umboð |

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

***Til kapitaleigararnar í P/F Elektron***

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Elektron fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, peningastreymsupp-gerð og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virksemi felagsins og peningastreymi í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2018 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum “Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum“.Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøða.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

## Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og aðrar ásetingar í føroysku grannskoðaralógini, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni, eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt felagið megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at felagið ikki er ført fyri at halda fram við rakstrinum.

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapinum, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiði er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 10. apríl 2019

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Finnbjørn Zachariasen
statsaut. revisor

# Upplýsingar um felagið

| | |
|---|---|
| **Felagið** | P/F Elektron<br>Staravegur 9<br>Postboks 3219<br>110 Tórshavn<br><br>Skrás.nr.: 100<br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Sóleyð Maibritt Hofgaard, formaður<br>Brian Smedemark<br>Poul Marner Mortensen<br>Atli Suni Leo<br>Marner Hansen, starvsfólkaumboð<br>Elsa Maria Hansen, starvsfólkaumboð |
| **Stjórn** | Ulla Joensen, stjóri |
| **Grannskoðan** | SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f<br><br>Staravegur 17<br>110 Tórshavn |

# Høvuðs- og lyklatøl

Gongdin hjá felagnum seinastu 5-árini kann lýsast við hesum høvuðs  og lyklatølum:

| | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| | tkr. | tkr. | tkr. | tkr. | tkr. |
| **Høvuðstøl** | | | | | |
| **Úrslit** | | | | | |
| Bruttoúrslit | 47.040 | 47.231 | 46.503 | 37.613 | 49.147 |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 1.570 | 2.025 | 1.848 | -5.071 | -5.863 |
| Úrslit frá fíggjarpostum | -734 | -1.489 | -1.304 | -1.505 | -1.398 |
| Ársúrslitið | 836 | 536 | 544 | -7.337 | -6.012 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 57.952 | 56.137 | 61.859 | 63.739 | 66.985 |
| Eginogn | 18.552 | 17.716 | 17.180 | 10.036 | 17.373 |
| **Peningastreymur frá:** | | | | | |
| - rakstrarvirksemi | 3.615 | 1.109 | -2.892 | 3.885 | 5.797 |
| - íløguvirksemi | -5.819 | -1.357 | -1.566 | -3.365 | -11.391 |
| - Íløgur í materiella støðisogn | -5.819 | -1.357 | -1.566 | -3.365 | -11.391 |
| - fíggingarvirksemi | 0 | -326 | 8.301 | 2.236 | 4.190 |
| Broytingar í tøkum peningi í árinum | -2.204 | -574 | 3.843 | 2.756 | -1.414 |
| Starvsfólkatal | 65 | 65 | 60 | 60 | 69 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Høvuðsavkast | 2,8% | 3,4% | 2,9% | -7,8% | -9,2% |
| Tryggleikastig | 32,0% | 31,6% | 27,8% | 15,7% | 25,9% |
| Eginpeningsavkast | 4,6% | 3,1% | 4,0% | -53,5% | -29,5% |
| Gjaldførislutfall | 107,8% | 174,1% | 139,2% | 71,8% | 69,6% |

Lyklatølini eru greidd úr hondum samsvarandi viðmælum og vegleiðingum frá Den Danske Finansanalytikerforening. Víst verður til allýsingar í pettinum um nýttan roknskaparhátt.

# Leiðslufrágreiðing

## Høvuðsvirksemi felagsins

Høvuðsvirksemi felagsins er at veita KT-loysnir til fyritøkur og stovnar. KT-loysnir fevna um skipanarmenning og skipanarrakstur, hýsing, KT-trygdarráðgeving og kunningartænastur.

## Fíggjarlig lýsing

Ársroknskapurin hjá Elektron í 2018 vísir eitt yvirskot eftir skatt upp á 0,8 mió.kr. Fíggjarstøðan javnvigar við 58,0 mió.kr., og eginognin er bókað til 18,6 mió.kr.

Bruttoúrslitið var 47,0 mió.kr. í 2018. Hetta er ein lækking upp á 0,2 mió.kr. í mun til árið fyri. Lækkingin í bruttoúrslitnum stavar í høvuðsheitum frá øktum kostnaði í sambandi við liðugtgerð av migreringsverkætlanini, sum Elektron hevur arbeitt við í nøkur ár og sum nú er liðug. Samlaði starvsfólkakostnaðurin hækkaði við 1,1 mió.kr. í mun til fjør og var í 2018 á 42,2 mió.kr. Hækkingin stavar í høvuðsheitum frá sáttmálabundnum lønarhækkingum. Elektron hevði 65 fólk í starvi í 2018. Samlaðu avskrivingarnar vóru 3,3 mió.kr. í 2018 og tað er 1,0 mió.kr. minni enn í 2017. Felagið kundi við ársenda 2018 inntøkuføra 0,8 mió.kr. frá atknýttum felagið.

Í árinum hevur Elektron framt íløgur í útgerð fyri 5,8 mió.kr. og felagið hevði við ársenda 2018 ein tøkan pening upp á 6,5 mió.kr.

# Leiðslufrágreiðing

## Virksemi felagsins

Tænasturnar hjá Elektron kunnu býtast upp í 3 høvuðsbólkar. Skipanarmenning og –rakstur, ráðgeving, hýsing og kunningartænastur.

Innan skipanarmenning og ráðgevingartænastur ger og viðlíkaheldur Elektron skipanir fyri fleiri almennar stovnar, fíggjarfyritøkur, SDC og nakrar privatar fyritøkur. Skipanarumhvørvið er fjøltáttað og Elektron hevur eina breiða forrætningsvitan vegna fjøltáttaða skipanarumhvørvið eins og Elektron hevur drúgvar royndir við at menna, røkja, ráðgeva og reka skipanir fyri kundar. Eitt lítið dømi um skipanir, sum Elektron hjálpir kundum við er skattaskipan, tollskipan, lønarskipan, gjaldsskipan, fíggjarskipan, intranetskipan, goymsluskipan, skipanir til grundskráir sum td. landsfólkayvirlit og virkiskráir, Vinnuglugga, Borgaraglugga, Mínrokning og Mínlækni. Skipanirnar eru mentar í ymskum tøknum og førleikin til forritnarmálini er breiður, og mest brúktu er C#, entity framework, WCF, Web API, Java, Spring framework, SharePoint, Angular JS og Umbraco og innan databasur er mest brúkta SQL, Oracle, MySQL, PostgreSQL og MariaDB.

Elektron hevur eisini drúgvar royndir innan KT-trygd. Samstundis sum at trygdarkrøvini alsamt herðast, veitir Elektron í alt størri mun ráðgeving innan KT-trygd til fleiri stovnar og fyritøkur.

Elektron veitir hýsingartænastur til eina røð av føroyskum kundum bæði á almenna og privata marknaðinum og til bæði stórar og smærri stovnar og fyritøkur. Hýsingartænasturnar eru ymiskar í vavi og innihaldi, har talan kann vera um alt frá samhýsing til samansettar heildarloysnir innan hýsingartænstur og skipanarrakstur. Elektron umsitur í dag umleið 1.100 servarar har fleiri túsund brúkarar eru íbundnir. Serliga er talan um servarar á Windows og Linux tøkni.

Umframt hýsingar-, menningar- og ráðgevingartænasturnar bjóðar Elektron skipanir innan kunningartænastu og her er talan um skipanir sum Mínrokning, print og pakking, Mínboks og Mínlykil. Mínrokning er ein avloysari fyri Rokningadepilin, sum hevur virka á føroyska marknaðinum í mong ár. Við hesi skipan kunnu bæði virkir og privatpersónar fáa rokningar talgilt og møguleiki er at rinda rokningar og stovna gjaldsavtalur umvegis Mínrokning, eins og kundin hevur møguleika at síggja ymisk hagtøl. Skipanin er í støðugari menning og fleiri loysnir verða knýttar til hesa skipan. Skipaninar Mínboks og Mínlykil eru við ársenda 2018 endaliga yvirtiknar av Gjaldstovuni og Talgildu Føroyum.

# Leiðslufrágreiðing

Alt KT-arbeiði hjá Elektron verður framt undir strongum KT-trygdareftirlitið, og Elektron fylgir ISF-standardi, ið ásetur leiðreglur fyri góðan KT-sið. Harafturat er Elektron bundið at krøvum frá Fíggjareftirlitinum, fyri tær tænastur sum Elektron veitir føroysku peningastovnunum og SDC.

Innan hýsingartænastuna hevur Elektron afturat servaraparkini havt ein mainframegrundvøll, har skipanir hjá eitt nú TAKS og peningastovnum hava verið mentar og riknar gjøgnum mong ár. Av tí at mainframegrundvøllurin er ov kostnaðarmikil at røkja og reka, var í 2012 avgjørt, at migrera alt skipanar- og rakstrarumhvøvið til MS tøkni, so mainframegrundvøllurin kann niðurleggjast. Hetta migreringsarbeiðið hevur verið drúgt – talan hevur verið um at umseta gott 40 forrit ella 6 mió kotulinjur frá forritaramálinum PL1 til C# og at uppbyggja eitt rakstrarumhvørvið á windows tøkni sum stuðlar undir teim mongu raksrarmannagondunum sum allar skipaninar og rakstrarumhvørvið krevur. Tann 25. november 2018 fekk Elektron endiliga alt skipanarumhvørvið at virka sum ætlað og í endanum av februar 2019 kundi Elektron niðurleggja mainframetøknina.

Henda tøkniliga umleggingin er ein tann største, ið er framd í Føroyum yvirhøvur. Nú allar skipaninar eru fluttar til annað tøkniligt umhvørvi, verður lættari at draga arbeiðsmegi og harvið framtíðartryggja skipanarumhvørvið, eisini í mun til kostnað sum heild.

**Vinningsbýti**

Nevndin skýtur upp, at einki vinningsbýti verður útgoldið fyri 2018.

**Íløgur**

Í 2018 hevur Elektron framt íløgur fyri umleið 5,8 mió.kr. Talan er um íløgur í tøkniliga útgerð sum stuðlar undir hýsingartænastuni sum heild.

**Váðar**

Marknaðurin er í støðugari broyting og tað setur størri krøv til fleksibilitetin hjá starvsfólkunum og felagnum sum heild. Elektron arbeiðir alsamt við at tillaða tænasturnar, so tær deils kunnu fylgja tørvi og ynski hjá okkara kundum og deils røkka út til ein breiðari kundaskara í Føroyum. Hetta er gjørt fyri at minka um váðan fyri stórum broytingum í inntøkugrundarlagnum frá ári til ár og fyri at tryggja framtíðar tænatur til marknaðin.

# Leiðslufrágreiðing

## Uttanhýsis umhvørvi

Felagið er í eini vinnu, sum ávirkar umhvørvið lutfalsliga lítið. Arbeitt verður tó áhaldandi við at minka um orkunýtsluna, m.a. við at umleggja miðsavnaða tøkni til meira orkuvinarliga tøkni. Mínrokning og Mínboks eru eisini tveir miðlar, sum gera tað møguligt at minka um pappírnýtsluna í Føroyum.

## Vitanarstøði

Elektron leggur stóran dent á, at hóskandi vitan og arbeiðsroyndir eru á øllum økjum í virkseminum. Vitan frá vitanardeiling millum starvsfólkini, ráðstevnur, gransking, skeið og eftirútbúgving hevur tí alt sera stóran týdning fyri felagið eins og tænastuveitingar til ein krevjandi kundaskara krevur, at starvsfólkini alla tíðina eru í menning. Eitt høgt vitanarstøði og avbjóðandi uppgávur er eisini við til at draga til sín nýggj starvsfólk, og harvið verður vitanarstøðið hjá felagnum enn meira fjølbroytt.

Felagið arbeiðir áhaldandi við sertifiseringum innan Microsoft, Cisco, HP, Projektleiðslu og KT-trygd.

## Framtíðarútlit

Løgtingið hevur sett sær sum mál at talgilda Føroyar. Málið er framsøkið og neyðugt, og Elektron sær stórar møguleikar í hesum innan allar 3 høvuðsbólkarnar í tænastugrundarlagnum hjá Elektron.

Elektron bjóðar seg fram á føroyska marknaðinum sum ein álítandi, smidligur og vitanarsterkur KT-veitari. Við meira enn 50 ár á baki, hevur Elektron hollar royndir innan skipanarmenning og skipanarrakstur sum ein dygdargóður veitari, ið strembar eftir at veita kundavinarligar brúkaraskipanir til føroyska marknaðin.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársroknskapinum.

## Partaeigaraviðurskifti

Hesir eigarar eru skrásettir í eigarabókini at hava meiri enn 5% av kapitalpørtunum:
BankNordik, Tórshavn
Betri Banki, Tórshavn
Føroya Landsstýri, Tórshavn

# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá P/F Elektron fyri 2018 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki C miðal.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

### Um innrokning og virðisáseting

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Harumframt verða virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum innroknaðar. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skylduni kann gerast upp álítandi.

Til at byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri fyri einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

## Rakstrarroknskapurin

### Bruttoúrslit

Felagið nýtir ásetingina í § 32 í ársroknskaparlógini og tískil er nettosølan ikki upplýst.

### Nettosøla

Nettosøla frá sølu av vørum og tænastum verður innroknað í rakstrarroknskapin, um váðaskifti, sum oftast í sambandi við útflýggjan til keypara, er farið fram og um inntøkan kann gerast upp álítandi og væntast móttikin. Nettosølan verður innroknað uttan mvg og onnur avgjøld og við frádrátti av øllum latnum avsláttrum.

# Nýttur roknskaparháttur

Harumframt verður arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning innroknað, so hvørt sum tað verður útført. Nettosølan svarar tískil til søluvirði av útførda arbeiðinum í árinum (framleiðsluhátturin). Nettosølan frá arbeiði í gerð verður innroknað, tá samlaðu inntøkurnar og kostnaðirnir á ordrunum, og í hvønn mun arbeiði er liðugt við ársroknskaparlok, kann uppgerast álítandi, og tá tað er sannlíkt, at fíggjarligur fyrimunur, herundir inngjaldingar, kann falla felagnum í lut.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir fevna um kostnaðir til útbreiðslu, sølu, lýsingar, umsiting, høli, tap uppá skuldarar v.m.

### Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um lønir, íroknað frítíðarløn og eftirlønir umframt aðrar kostnaðir til sosiala trygd v.m. til starvsfólk felagsins. Móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum eru drigin frá starvsfólkakostnaðinum.

### Av og niðurskrivingar

Av og niðurskrivingar fevna um ársins av- og niðurskrivingar upp á materiella støðisogn.

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentur, kursvinning og -tap viðvíkjandi virðisbrøvum, skuld og flytingar í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum.

### Inntøkur av kapitalpørtum í dótturfeløgum og leyst atknýttum feløgum

Írakstrarroknskapi felagsins verður lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá einstøku leyst atknýttu feløgunum innroknaður aftaná javning av lutfalsligum parti av innanhýsis vinningi/tapi.

### Skattur av ársúrslitinum

Skattur av ársúrslitinum fevnir um partafelagsskatt og broyting í útsettum skatti, íroknað broytingar ið stava frá broyting í skattastigi. Skattur, sum viðvíkur ársúrslitinum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin og skattur, sum viðvíkur bókingum beinleiðis á eginognini, verður innroknaður beinleiðis á eginognina.

# Nýttur roknskaparháttur

## Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður virðisásett til kostprís við ískoyti av uppskrivingum og við frádrátti av samlaðum av- og niðurskrivingum.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu. Fyri egnar framleiddar ognir fevnir kostprísurin um beinleiðis og óbeinleiðis kostnaðir til tilfar, deilir, undirútvegarar og løn.

Kostprísurin á eini ogn verður býttur sundur í serstakar partar, ið verða avskrivaðir hvør sær, um nýtslutíðin er ymisk fyri ymsu partarnar.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er grundað á hesar metingar um nýtslutíðina á ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Bygningar | 10-50 ár | 0 % |
| Rakstrartól, innbúgv og onnur støðisogn | 2-10 ár | 0 % |

Vinningur ella tap verða innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavist aðrar rakstrarinntøkur ella aðrar rakstrarkostnaðir.

### Kapitalpartar í dótturfeløgum og leyst atknýttum feløgum

Kapitalpartar í dótturfeløgum og leyst atknýttum feløgum verða virðisásettir til lutfalsliga partin av roknskaparliga innara virðinum í feløgunum, gjørt upp sambært roknskaparháttinum hjá samtakinum, við frádrátti ella ískoyti av ikki staðfestum innanhýsis vinningi og tapi í samtakinum og við ískoyti ella frádrátti av restvirðinum á positivum ella negativum goodwill, sum er gjørt upp sambært yvirtøkuháttinum.

Kapitalpartar í dótturfeløgum og leyst atknýttum feløgum við negativum roknskaparligum innara virði verða virðisásettir til 0 kr., og ein møgulig áogn hjá hesum feløgum verður niðurskrivað í tann mun áognin verður mett órøkkandi. Í tann mun móðurfelagið hevur eina rættarliga ella veruliga skyldu til at taka á seg fíggjarligar skyldur, sum eru størri enn áognin, verður restupphæddin innroknað sum ein avseting.

# Nýttur roknskaparháttur

Nettouppskriving av kapitalpørtum í dótturfeløgum og leyst atknýttum feløgum verður flutt til tiltakspening til nettouppskriving eftir innaravirðisháttinum undir eginognini, í tann mun roknskaparliga virðið er hægri enn kostprísurin. Vinningsbýti frá dótturfeløgum, ið væntast samtykt áðrenn ársfrásøgnin hjá P/F Elektron verður góðkend, verður ikki bundið sum tiltakspeningur.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís.

Niðurskriving verður gjørd móti væntaðum tapi, tá ið tað verður mett at vera ein óvildug ábending um, at ein áogn ella áognarbólkur eru minkað í virði. Er ein óvildug ábending um, at ein einstøk áogn er virðisminkað, verður henda áogn niðurskrivað.

**Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning**

Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning verða virðisásett til søluvirðið av framda arbeiðinum. Søluvirðið verður uppgjørt við støði í, hvussu stórur partur av arbeiðinum er liðugur fíggjarstøðudagin og samlaðu væntaðu inntøkunum av einstaka arbeiðinum í gerð. Stigið fyri liðugtgerð verður gjørt upp sum parturin av staðfestum kostnaði í mun til samlaða metta kostnaðin á einstøka arbeiðinum í gerð.

Tá ið søluvirðið av einum arbeiði í gerð ikki kann gerast upp álítandi, verður søluvirðið virðisásett til staðfestan kostnað ella nettosøluvirðið, um hetta er lægri.

Tað einstaka arbeiðið í gerð verður innroknað í fíggjarstøðuna sum áogn ella skuld. Nettoognir fevna um samlaðu arbeiðini í gerð, har søluvirðið av framda arbeiðinum er hægri enn ávegisfaktureringin. Nettoskyldur fevna um arbeiði í gerð, har ávegisfaktureringin er hægri enn søluvirðið.

Kostnaðir í sambandi við søluarbeiði og at fáa í lag sáttmálar verða innroknaðir í rakstrarroknskapin, so hvørt sum hesir verða staðfestir.

**Virðisbrøv og kapitalpartar**

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið fevna um børsskrásett partabrøv og lánsbrøv, verða virðisásett til dagsvirði fíggjarstøðudagin. Ikki børsskrásett virðisbrøv verða virðisásett til dagsvirði grundað á eitt roknað kapitalvirði.

**Vinningsbýti**

Vinningsbýti, sum leiðslan skjýtur upp at útluta fyri roknskaparárið, verður innroknað sum ein skylda.

# Nýttur roknskaparháttur

## Avsetingar

Avsetingar fevna um væntaðar kostnaðir til ábyrgdarbindingar, tap upp á arbeiði í gerð og umskipanir v.m. Avsetingar verða innroknaðar, tá ið felagsins, orsakað av eini undanfarnari hending, hevur eina rættarliga ella veruliga skyldu, og tað er sannlíkt, at felagsins skal av við fíggjarligar ágóðar fyri at gjalda skylduna.

Avsetingar verða virðisásettar til dagsvirði.

Tá ið tað er sannlíkt, at samlaðu kostnaðirnir viðvíkjandi einum arbeiði í gerð verða hægri enn samlaðu inntøkurnar, verður samlaða væntaða tapið upp á arbeiðið í gerð innroknað sum ein avseting. Avsetingin verður innroknað undir framleiðslukostnaðum.

## Partafelagsskattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku javnað fyri skatt av skattskyldugum inntøkum undanfarin ár.

Útsettur skattur verður virðisásettur eftir fíggjarstøðu skuldarháttinum av øllum fyribils munum millum roknskaparligu og skattligu virðini av ognum og skyldum.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattastigum, sum við galdandi lóg fíggjarstøðudagin verða galdandi, tá ið tann útsetti skatturin væntandi skal gjaldast.

## Skyldur

Við lántøku verða fíggjarligar skyldur innroknaðar við eini upphædd svarandi til móttiknu upphæddina frádrigið transaktiónskostnaðir. Seinni verða fíggjarligu skyldurnar virðisásettar til amortiseraðan kostprís svarandi til kapitaliseraða virðið við nýtslu av effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Aðrar skyldur verða virðisásettar til nettorealisationsvirði.

## Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Transaktiónir í fremmandum gjaldoyra verða í fyrstu atløgu umroknaðar til kursin transaktiónsdagin. Gjaldoyramunir, ið íkoma millum kursin transaktiónsdagin og kursin gjalddagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarlig upphædd.

## Nýttur roknskaparháttur

Áogn, skuld og aðrar peningaligar upphæddir í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðar til gjaldoyrakursin fíggjarstøðudagin. Munurin millum kursin fíggjarstøðudagin og kursin tann dagin, tá ið áognin ella skuldin íkom ella innroknaðu/ognarførdu upphæddina í seinasta ársroknskapi, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarligum inntøkum og útreiðslum.

Støðisogn, ið er keypt í fremmandum gjaldoyra, verður innroknað til kursin keypsdagin.

## Peningastreymsuppgerð

Peningastreymsuppgerðin vísir peningastreymar felagsins í árinum býtt á økini rakstrar-, íløgu- og fíggingarvirksemi í árinum, broytingar í tøkum peningi í árinum umframt tøka pening felagsins við ársbyrjan og ársenda.

Ávirkanin á tøkan pening í sambandi við keyp og sølu av feløgum verður víst serskilt undir peningastreymi frá íløguvirksemi. Peningastreymar frá keyptum feløgum verða tiknir við í peningastreymsuppgerðina frá keypsdegnum, og peningastreymar viðvíkjandi seldum feløgum verða tiknir við fram til søludagin.

**Peningastreymur frá rakstrarvirksemi**

Peningastreymur frá rakstrarvirkseminum verður uppgjørdur sum ársins úrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarupphæddir, broytingar í arbeiðskapitali umframt goldnum partafelagsskatti.

**Peningastreymur frá íløguvirksemi**

Peningastreymur frá íløguvirkseminum fevnir um gjøld í sambandi við keyp og sølu av feløgum og virksemi umframt keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn.

**Peningastreymur frá fíggingarvirksemi**

Peningastreymur frá fíggingarvirkseminum fevnir um broytingar í stødd ella samanseting av felagskapitali felagsins og kostnaðum knýttum at hesum umframt upptøku av lánum, gjaldan av avdráttum á rentuberandi skuld og útgjaldi av vinningsbýti til partaeigarar.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv við eini gildistíð upp á minni enn 3 mánaðir, og sum uttan forðing kunnu umbýtast til tøkan pening, og har vandin fyri virðisbroytingum er ótýðandi.

# Nýttur roknskaparháttur

**Yvirlit yvir høvuðs- og lyklatøl**

Frágreiðing til lykatølini.

| | |
|---|---|
| Høvuðsavkast | Úrslit áðrenn fíggjarpostar x 100 / Ognir til samans |
| Tryggleikastig | Eginogn ultimo x 100 / Ognir til samans við árslok |
| Eginpeningsavkast | Vanlig úrslit eftir skatt x 100 / Miðal eginogn |
| Gjaldførislutfall | Ogn í umferð x 100 / Stuttfreistað skuld |

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2018

| | Nota | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | tkr. |
| **Bruttoúrslit** | | **47.040.032** | **47.231** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -42.199.581 | -41.104 |
| Av- og niðurskrivingar | 3 | -3.270.396 | -4.102 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **1.570.055** | **2.025** |
| Inntøkur frá kapitalpørtum í leyst atknýttum feløgum | 4 | 778.750 | 0 |
| Fíggjarligar inntøkur | | 65 | 0 |
| Fíggjarligir kostnaðir | | -1.513.006 | -1.489 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **835.864** | **536** |
| Skattur av ársúrslitinum | 2 | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | | **835.864** | **536** |

**Uppskot til yvirskotsbýti**

| | | |
|---|---|---|
| Flutt úrslit | 835.864 | 536 |
| | **835.864** | **536** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2018

| | Nota | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | tkr. |
| **Ogn** | | | |
| Grundøki og bygningar | | 31.537.494 | 31.906 |
| Rakstrartól, innbúgv og onnur støðisogn | | 5.952.776 | 3.035 |
| **Materiell støðisogn** | 3 | **37.490.270** | **34.941** |
| Kapitalpartar í leyst atknýttum feløgum | 4 | 3.278.750 | 2.500 |
| **Fíggjarlig støðisogn** | | **3.278.750** | **2.500** |
| **Støðisogn til samans** | | **40.769.020** | **37.441** |
| Áogn av sølu og tænastum | | 6.161.436 | 5.038 |
| Onnur áogn | | 4.492.544 | 4.907 |
| **Áogn** | | **10.653.980** | **9.945** |
| Virðisbrøv | | 1.085 | 1 |
| **Virðisbrøv** | | **1.085** | **1** |
| **Tøkur peningur** | | **6.527.536** | **8.750** |
| **Ogn í umferð til samans** | | **17.182.601** | **18.696** |
| **Ogn til samans** | | **57.951.621** | **56.137** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2018

| | Nota | 2018<br>kr. | 2017<br>tkr. |
|---|---|---|---|
| **Skyldur** | | | |
| Felagskapitalur | | 6.702.000 | 6.702 |
| Uppskrivingargrunnur | | 12.618.710 | 12.619 |
| Fluttur vinningur | | -769.116 | -1.605 |
| **Eginogn** | 6 | **18.551.594** | **17.716** |
| Aðrar avsetingar | 7 | 0 | 819 |
| **Avsetingar til samans** | | **0** | **819** |
| Lánistovnar | | 23.460.215 | 26.864 |
| **Langfreistað skuld** | 8 | **23.460.215** | **26.864** |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 8 | 3.402.800 | 0 |
| Peningastovnar | | 0 | 15 |
| Undangoldið frá kundum | | 1.220.320 | 0 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 6.949.909 | 2.711 |
| Undanfakturerað arbeiði í gerð | 5 | 0 | 2.428 |
| Onnur skuld | | 4.366.783 | 5.584 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **15.939.812** | **10.738** |
| **Skuld til samans** | | **39.400.027** | **37.602** |
| **Skyldur til samans** | | **57.951.621** | **56.137** |
| Leiga og langleiguskyldur | 9 | | |
| Veðsetingar og trygdarveitingar | 10 | | |
| Nærstandandi partar og ognarviðurskifti | 11 | | |

# Peningastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember 2018

| | Nota | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | tkr. |
| Ársúrslit | | 835.864 | 536 |
| Javningar | 12 | 4.004.587 | 5.592 |
| Broyting í rakstrarkapitali | 13 | 287.062 | -3.529 |
| **Peningastreymur frá rakstri áðrenn fíggjarpostar** | | **5.127.513** | **2.599** |
| Rentuinngjaldingar og líknandi | | 65 | 0 |
| Rentuútgjaldingar og líknandi | | -1.513.006 | -1.490 |
| **Peningastreymur frá rakstrarvirksemi** | | **3.614.572** | **1.109** |
| Keyp av materiellari støðisogn | | -5.818.940 | -1.357 |
| **Peningastreymur frá íløguvirksemi** | | **-5.818.940** | **-1.357** |
| Afturrindan av skuld kredittstovnar | | 0 | -326 |
| **Peningastreymur frá fíggingarvirksemi** | | **0** | **-326** |
| **Broyting í tøkum peningi** | | **-2.204.368** | **-574** |
| Tøkur peningur | | 8.747.041 | 9.306 |
| Virðisbrøv | | 1.060 | 1 |
| Kassakredittur | | -15.112 | 0 |
| Tøkur peningur 1. januar 2018 | | 8.732.989 | 9.307 |
| **Tøkur peningur 31. desember 2018** | | **6.528.621** | **8.733** |
| Tøkur peningur kann sundurgreinast soleiðis: | | | |
| Tøkur peningur | | 6.527.536 | 8.747 |
| Virðisbrøv | | 1.085 | 1 |
| Kassakredittur | | 0 | -15 |
| **Tøkur peningur 31. desember 2018** | | **6.528.621** | **8.733** |

# Notur til ársfrásøgnina

| | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | tkr. |
| **1** | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Lønir | 35.694.716 | 34.981 |
| | Eftirlønartryggingar | 3.638.403 | 3.491 |
| | Onnur lønartengd gjøld | 2.866.462 | 2.632 |
| | | **42.199.581** | **41.104** |
| | **Av hesum er samsýning til stjórn og nevnd** | **1.361.345** | **1.841** |
| | Starvsfólkatal í miðal | 65 | 65 |
| **2** | **Skattur av ársúrslitinum** | | |
| | | **0** | **0** |

# Notur til ársfrásøgnina

## 3 Materiell støðisogn

| | Grundøki og bygningar | Rakstrartól, innbúgv og onnur støðisogn | Til samans |
|---|---|---|---|
| Keypsvirði 1. januar 2018 | 27.888.112 | 10.981.609 | 38.869.721 |
| Tilgongd í árinum | 1.306.817 | 4.512.121 | 5.818.938 |
| Frágongd í árinum | 0 | -3.393.094 | -3.393.094 |
| Keypsvirði | 29.194.929 | 12.100.636 | 41.295.565 |
| Uppskriving 1. januar 2018 | 14.717.000 | 0 | 14.717.000 |
| Uppskriving | 14.717.000 | 0 | 14.717.000 |
| Av- og niðurskrivingar 1. januar 2018 | 10.699.769 | 7.945.224 | 18.644.993 |
| Avskrivingar í árinum | 1.674.666 | 1.595.730 | 3.270.396 |
| Afturførdar avskrivingar upp á seldar ognir | 0 | -3.393.094 | -3.393.094 |
| Av- og niðurskrivingar | 12.374.435 | 6.147.860 | 18.522.295 |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2018** | **31.537.494** | **5.952.776** | **37.490.270** |
| Uppskrivingar við frádrátti av gjørdum av- og niðurskrivingum | 10.928.047 | 0 | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2018 áðrenn uppskriving** | **20.609.447** | **5.952.776** | |

# Notur til ársfrásøgnina

| | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | tkr. |
| **4** | **Kapitalpartar í leyst atknýttum feløgum** | | |
| | Keypsvirði 1. januar 2018 | 5.250.000 | 5.250 |
| | Keypsvirði | 5.250.000 | 5.250 |
| | Virðisjavningar 1. januar 2018 | -2.750.000 | -2.750 |
| | Ársúrslit | 778.750 | 0 |
| | Virðisjavningar | -1.971.250 | -2.750 |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember 2018** | **3.278.750** | **2.500** |

Kapitalpartar í leyst atknýttum feløgum kunnu sundurgreinast soleiðis:

| Navn | Heimstaður | Felagskapitalur | Atkvøðu- og ognarpartur | Eginogn | Ársúrslit |
|---|---|---|---|---|---|
| P/F MínBoks | Tórshavn | 5.250.000 | 50% | 6.557.500 | 0 |

| | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | tkr. |
| **5** | **Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning** | | |
| | Arbeiði í gerð, søluprísur | 0 | 21.598 |
| | Arbeiði í gerð, ávegisfakturerað | 0 | -24.025 |
| | | **0** | **-2.427** |
| | Er innroknað soleiðis í fíggjarstøðuna: | | |
| | Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning undir ogn | 0 | 0 |
| | Móttikin undangjøld undir skyldum | 0 | -2.428 |
| | | **0** | **-2.428** |

# Notur til ársfrásøgnina

## 6 Eginogn

| | Felags-kapitalur | Uppskrivingar grunnur | Fluttur vinningur | Til samans |
|---|---|---|---|---|
| Salda 1. januar 2018 | 6.702.000 | 12.618.710 | -1.604.980 | 17.715.730 |
| Ársúrslit | 0 | 0 | 835.864 | 835.864 |
| **Eginogn** | **6.702.000** | **12.618.710** | **-769.116** | **18.551.594** |

Felagskapitalurin fevnir um 6.702.000 partabrøv á áljóðandi kr. 1. Eingin partabrøv hava serlig rættindi.

Gongdin í felagskapitalinum kann lýsast soleiðis:

| | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| | kr. | kr. | kr. | kr. | kr. |
| Felagskapitalur 1. januar 2018 | 6.702.000 | 6.702.000 | 6.701.000 | 6.701.000 | 6.701.000 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 1.000 | 0 | 0 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Felagskapitalur** | **6.702.000** | **6.702.000** | **6.702.000** | **6.701.000** | **6.701.000** |

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | tkr. |
| **7 Aðrar avsetingar** | | |
| Salda 1. januar 2018 | 819.193 | 1.922 |
| Nýtt í árinum | -819.193 | -1.103 |
| **Salda 31. desember 2018** | **0** | **819** |

Avsetingin fevnir um tap upp á arbeiði í gerð.

# Notur til ársfrásøgnina

## 8 Langfreistað skuld

| | Skuld 1. januar 2018 | Skuld 31. desember 2018 | Avdráttur komandi ár | Restskuld eftir 5 ár |
|---|---|---|---|---|
| Lánistovnar | 26.863.015 | 26.863.015 | 3.402.800 | 9.849.015 |
| | **26.863.015** | **26.863.015** | **3.402.800** | **9.849.015** |

## 9 Leiga og langleiguskyldur

**Leiga og langleiguskyldur**

Langleiguskyldur frá operationellari langleigu.
Framtíðar langleigugjøld til samans:

| | 2018<br>kr. | 2017<br>tkr. |
|---|---|---|
| Innan 1 ár | 2.036.000 | 0 |
| Millum 1 og 5 ár | 8.144.000 | 0 |
| Eftir 5 ár | 0 | 0 |
| | **10.180.000** | **0** |

## 10 Veðsetingar og trygdarveitingar

Í grundøki og bygningi felagsins við einum roknskaparligum virði á 31,5 mió.kr., eru veðsett ognarveðbrøv á til samans 58,2 mió.kr.

Felagið hevur veitt tollábyrgd fyri til samans 350 tkr.

Á felagnum hvíla aðrar eventualskyldur á 2,4 mió.kr. Eventualskyldan er ikki innroknað í ársroknskapin fyri 2018.

# Notur til ársfrásøgnina

## 11 Nærstandandi partar og ognarviðurskifti

### Handlar

Allar transaktiónir felagsins við nærstandandi partar eru framdar til marknaðartreytir.

### Ognarviðurskifti

Niðanfyristandandi kapitaleigarar eru skrásettir í eigarabók felagsins at eiga minst 5% av atkvøðunum ella minst 5% av felagskapitalinum:

P/F BankNordik
P/F Betri Banki
Føroya Landsstýri

| | 2018<br>kr. | 2017<br>tkr. |
|---|---|---|
| **12 Peningastreymsuppgerð javningar** | | |
| Fíggjarligar inntøkur | -65 | 0 |
| Fíggjarligir kostnaðir | 1.513.006 | 1.490 |
| Av- og niðurskrivingar íroknað tap og vinning við sølu | 3.270.396 | 4.102 |
| Inntøkur frá kapitalpørtum í leyst atknýttum feløgum | -778.750 | 0 |
| | **4.004.587** | **5.592** |

## 13 Peningastreymsuppgerð – broyting í rakstrarkapitali

| | | |
|---|---|---|
| Broyting í áogn | -708.732 | 2.519 |
| Broyting í útvegarum v.m. | 1.814.987 | -4.945 |
| Broyting í øðrum avsetingum | -819.193 | -1.103 |
| | **287.062** | **-3.529** |